## Bilur til sølu

Nýsýnaður Opel Astra Stationcar.
Diesel og í besta standi.
Prísur 18.000,-
Tlf. 289696 / 317247

## Hús til leigu

Eitt hús við besta útsýni í Havn til leigu frá 1. januar 2007
Tlf. 289696 / 317247

## Kunngerð

Almennu býráðsfundirnir hjá Vágs býráð í 2007 verða hesar týsdagar:

16/1, 20/2, 20/3, 17/4, 22/5, 19/6, 28/8, 25/9, 23/10, 20/11, 11/12

Fundirnir eru settir at verða kl. 17.30
Um ikki annað verður fráboðað

**Vágs Býráð**

# Kunngerð um útgjaldsdagar í 2007

Við heimild í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum um arbeiðsloysis-trygging og arbeiðsávísing, § 16, stk. 4, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Fyri 2007 verður arbeiðsloysis-stuðul útgoldin fyri í alt 252 dagar.
Stk. 2. Umframt leygar- og sunnudagar verður ikki útgoldið fyri hesar halgidagar:

- Skírhósdag (5. apríl)
- Langafríggjadag (6. apríl)
- 2. páskadag (9. apríl)
- Dýra biðidag (4. mai)
- Kristi himmalsferðadag (17. mai)
- 2. hvítusunnudag (28. mai)
- 1. jóladag (25. desember)
- 2. jóladag (26. desember)

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2007 og er galdandi fyri alt árið 2007.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina 14. november 2006
Alfred Petersen (sign.) formaður
/Ernst Jacobsen (sign.)

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 20 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður val t av Føroya Landsstýri.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

# Reingerðarfólk til Vestmanna Skúla

Fyri eitt av reingerðarfólkunum í farloyvi verður hervið søkt eftir avloysara at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið er tíðaravmarkað til 1. november 2007.

Arbeiðið er lønt sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Vestmanna Kommunu, tlf. 470110.

Skrivlig umsókn skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. januar 2007, kl. 1200.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**Vestmanna Kommuna**

## Yvirumsjónarmaður søkist til Leirvíkar Kommunu

Søkt verður eftir yvirumsjónarmanni til Leirvíkar Kommunu at byrja 1. februar 2007.

Yvirumsjónarmaðurin hevur ábyrdina av at leggja til rættis, samskipa og leiða arbeiði hjá teim ymsu arbeiðsbólkunum innan tekniska økið í kommununi.

Yvirumjónarmaðurin skal hava tekniska útbúgving og praktiskar royndir og duga at leiða og samskipa arbeiðið.

Lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafe-lagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til borgarstjóran tlf. 443006 ella 743006.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi hósdagin 28. desember 2006 kl. 12.00.

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# PEDAGOGUR

## Vit søkja eftir 1 pedagogi

Søkt verður eftir einum pedagogi 35 tímar um vikuna, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-5 ár. Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**

- Trivnaðin
- Opinleika
- Samarbeiði

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Heldur tað verða spennandi og mennandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagog-felag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad, tlf. 31 78 78.

Umsókn við avrita av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 5. januar 2007.

Barnagarðurin á Konmansmýru

Lesið Sosialin - so eru tit við